Jørgen Niclasen
Bárður á Lakjuni
Beinir Johannesen
Árni Skaale
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jacob Vestergaard
løgtingsfólk

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 37/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 4 verður strikað.

Viðmerkingar
Undir 2. viðgerð varð eitt broytingaruppskot samtykt, og broytingin í § 1, nr. 7 í upprunauppskotinum bleiv sum avleiðing til § 1, nr. 4.

Við hesi broyting, har § 1, nr. 4 verður tikin úr uppskotinum til broytingarlóg, verður ásetingin í § 154 b verandi í skattalógini.

Broytingaruppskotið merkir, at inngjald til norska Folketrygden (NAV) framvegis verður roknað sum ein skattur.

Hendan broyting kom í skattalógina í 2013 og varð tá einmælt samtykt av øllum flokkum í Løgtinginum.

Í viðmerkingum til lógaruppskotið frá landsstýrinum tá, stóð millum annað:

"Í dupultskattahøpi verður Folketrygden, ikki roknað sum skattur, men eftir vanligum búskaparligum definitiónum er eingin ivi um, at Folketrygden er ein skattur."

Nógvir føroyingar, sum arbeiða uttanlands, eru noyddir at rinda til Folketrygden. Inngjaldið er 8,2% av lønini. Hendan trygging dekkar eina rød av umstøðum, men stórur partur er eftirløn. Felags fyri øll útgjøld, eisini eftirløn, er galdandi, at tey eru skattskyldug við útgjald.

Um hetta broytingaruppskot ikki verður samtykt, merkir tað, at alt verður dupultskattað, t.v.s. bæði við inngjald og útgjald.

Nógv orrusta var, tá vit í Føroyum fóru frá at eftirskatta eftirlønir til at forskatta eftirlønir. Við fyriliggjandi lógaruppskoti verður talan um bæði forskatting og eftirskatting av eftirlønum hjá ávísum útisiglarum. Tað kann ikki verða rímiligt.

Landsstýrið sigur í viðmerkingunum til hesa broyting, at av tí at hesir persónar kunnu verða undantiknir at rinda til Heilsutrygd og Samhaldsfasta, so skal Folketrygden ikki kunna dragast frá. Fyri tað fyrsta er samanberingin als ikki fevnandi, tí Folketrygden er so nógv meir enn hesi bæði nevndu. Í øðrum lagi er hetta ikki heilt rætt, tí landsstýrið (í hesum føri Heilsutrygd) er farið í Hægstarætt við persónum við kravi um, at hóast rindan til Folketrygden, skal eisini rindast til Heilsurtrygd. Málið er ikki avgreitt í Hægstarætti.

Fyri at sleppa undan dupultskatting verður hetta broytingaruppskot lagt fram.

Á Løgtingi, 15. desember 2023

Jørgen Niclasen	Bárður á Lakjuni	Beinir Johannesen
Árni Skaale	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur	Jacob Vestergaard